


*Nr. 7* | *29. mars 2020* | *80. árg.*

# Undrini á krossinum

Asbjørn Kvalbein hevði eina andakt um, tá Jesus hekk á krossinum. Har hendu fleiri undur, sovorðið, sum er yvirnatúrligt.

Fyrst legðist myrkur um alt landið frá middegi til klokkan trý. Tað var Gud, sum vísti vreiði sína móti syndini. Jesus tók allar heimsins syndir á seg, og Guds vreiði rakti hann.

So skrædnaði hetta tjúkka teppið, sum hekk uppi og deildi tvey rúm sundur, tað heilaga frá tí allar heilagsta. Inn í tað allar heilagsta slapp bara ein persónur og bara eina ferð um árið, og tað var høvuðspresturin. Men við krossardeyða Jesu, er vegurin opin inn til Guds trónu. Nú kunnu vit við frímóði stíga inn fyri trónuna, biðja um fyrigeving og siga, hvat ið liggur okkum á hjarta. Hetta, at teppið skrædnaði frá í erva, er eitt undur, tí um tað skrædnaði av sliti, skuldi tað skrædna tvørturum.

Beint, áðrenn Jesus dró andan fyri seinastu ferð, rópti hann: „Faðir, í tínar hendur gevi eg anda mín!“ Hetta er eitt stórt undur og skuldi ikki kunnað latið seg gjørt, tí lunguni fyltust so líðandi við vatni hjá einum, sum varð krossfestur, og hann fekk illa anda og kikkaði eftir ondini, og tosa kundi hann als ikki. Men Jesus rópti við harðari rødd: „Faðir, í tínar hendur gevi eg anda mín!“ Rómverski herhøvdingin, sum stóð vakt undir krossinum, hevði sæð mangar krossfestingar, og hann visti, at her hendi okkurt yvirnatúrligt, tí gav hann Gudi æruna og segði: „Av sonnum var hesin maður rættvísur!“ (Luk. 23,47).

Og tað er eisini tann bønin, vit skulu biðja, tá ið vit fyri seinastu ferð leggja eyguni saman. Vit skulu geva okkum upp í Guds hendur og biðja: „Faðir, í tínar hendur gevi eg anda mín“!

*Effie Campbell.*

# Kona Kleopasar – húsmóðirin 3:4

*Aril Edvardsen*

Hin triðja konan við krossin var Maria, kona Kleopasar.

Kleopas var annar av teimum báðum Emmaus-fararunum, sum verða umrøddir í Lukas 24. Tað tykist, sum hann búði í Emmaus, einari lítlari fátækari bygd, sum lá ellivu kilometrar frá Jerusalem.

Kleopas hoyrdi ikki upp í yvirstættin. Hann var ein vanligur arbeiðsmaður, sum stríddist fyri tað dagliga breyðið. Hesi hjúnini vóru foreldur at Jákupi lítla og Jósefi, sigur Bíblian okkum. Tey høvdu fleiri børn.

**Maria, kona Kleopasar, var húsmóðirin, eitt dømi um tað vanliga menniskjað**. Hon hevði tað dagliga húsarbeiðið at stríðast við. Hon stákaðist fyri mann og børn – ein fátæk bygdarkona. Men eisini hon mátti til Jesu Kristi kross at fáa frelsuna.

Kanska sigur tú eisini um teg sjálvan, at tú ert „bara eitt vanligt menniska“ – ein vanligur arbeiðsmaður, ein húsmóðir. Ja, tá eru krossurin og Maðurin akkurát fyri teg. Kom til Jesu Kristi kross og tak ímóti Honum, sum hekk á krossinum og doyði fyri tínar syndir! Hann er tín frelsa.

*Effie Campbell* umsetti.

# Raðfesting

Onkur hevur sagt: „Lívið er størsta gávan. Tað er bara keðiligt, at so mong eru, sum ongantíð geva sær stundir at pakka hana út.“

Í Sálmi 65,5 stendur: „Sælur er hann, ið tú velur og letur koma nær at búgva í forgørðum tínum.“ Tað kundi ljóða, sum Gud letur summi búgva nær sær, meðan onnur eru útistongd og ikki sleppa upp í part.

Men soleiðis er tað tíbetur ikki. Jesus sigur í Jóh. 6,37, at „tann, sum kemur til mín, vil eg als ikki reka burtur.“ Gud loyvir øllum teimum, sum koma til Jesusar, at liva í Hansara nærveru.

Men tað tekur tíð at pakka Guds frelsugávu út. Tað er ein lívlong uppgáva. Um tú ikki raðfestir Gud fremst í lívi tínum, fært tú ikki tað maksimala út úr lívinum – uttan mun til hvussu stórar ognir tú eigur.

Bíða ikki, til tú FÆRT betri stundir. Tú fært ongantíð betri tíð enn NÚ at liva í Guds nærveru. Tað er ein spurningur um RAÐFESTING. Í Guds nærveru uppliva vit, at „mítt góða (mín sanna lukka) er at vera (at liva) Gudi nær.“ Sálm. 73,28.

*Effie Campbell* umsetti.

# Eitt lyfti til biðjandi foreldur

*„... úr fíggindalandi venda tey heim aftur.“ Jer. 31,16.*

Livir tú undir einari tungari skuldarbyrði, og kennir tú teg at vera við undirlutan, av tí at barn títt er vilst av leið? Gevst við tí! Bíblian lærir okkum, at børn viðhvørt rætt og slætt ikki vilja lurta eftir ráðunum frá foreldrum sínum. Salomon skrivaði av egnum royndum: „Vitur sonur aktar áminning faðirs síns, men spottarin ikki eftir átølum lurtar.“ Orðt. 13,1.

Jesus segði heldur ikki, at pápin stóð til svars fyri, at burturvilsti sonurin fór burtur og viltist út í óføri. (Sí Luk. 15,11). Um tú gjørdi títt besta, so gevur Gud tær heldur ikki ábyrgdina. Satt at siga fáa vánalig foreldur viðhvørt góð børn, og góð foreldur fáa viðhvørt børn, sum koma illa fyri.

Tvey tey fyrstu børnini hjá Gudi vóru sett í eitt fullkomið paradís, og kortini gjørdu tey uppreistur. Vit fáa øll loyvi at velja. Øll børn gevast einaferð at vera børn, og tá mugu tey sjálv taka ábyrgd fyri gerðir sínar. Um tú hevur gjørt títt besta sum pápi og mamma, so skalt tú ikki lata Djevulin undirdíkja teg við skuldarkenslu. Og um tú hevur svikið í leiklutinum sum pápi ella mamma, er tað ikki ein ófyrigevilig synd.

Gud vil ikki bara fyrigeva tær, tú sleppur at krøkja teg upp í hetta undurfulla lyftið: „... Halt rødd tína frá gráti og eygum tínum frá tárum; tí at tú fært løn fyri møði tína, sigur Harrin – úr fíggindalandi venda tey heim aftur.“ Jer. 31,16.

Gev ikki børn tíni upp, tí tað hevur Gud ikki gjørt. Halt á at biðja og trúgva, og lat Gud arbeiða í teimum.

*„... et Ord til Dagen“*
*Effie Campbell* umsetti.

---

Guds orð varð ikki givið okkum fyri at økja um okkara kunnleika, men fyri at umbroyta lív okkara.

*e.c.* ums.

# Bjargingarmenn

*Rune Edvardsen*

Tá ið vit taka ímóti Jesusi, taka vit øll ímóti kallinum at vera hansara lærusveinar. Tí skulu vit lærast upp í øllum boðum hansara, og hetta ræður ikki minst um missiónsboðini.

Kjarnin í frelsuboðskapinum er, at Gud er kærleiki. Henda kærleikan eru vit skapt at luta við øll, sum eru skapt í Guds mynd. Tað finst ein ævig ætlan, har tú og Gud eru ætlað at vera saman.

Vit eru kallað at vera bjargingarmenn. Gud hevur eina sorg í hjarta sínum um hvønn tann, sum glatast.

Effie Campbell *umsetti.*

# Ánaraskifti

At verða frelstur førir við sær eitt ánaraskifti. Tú gevur Jesusi „rattið" í tínum lívi og flytur teg úr „førarasetrinum" og verður „ferðafólk". Tú letur hann koyra títt lív tann vegin, hann vil hava teg. Tað er trygt, tí hann kennir vegin gjøgnum ein óndan og ótryggan heim betri enn vit. Hetta kalla vit umvending, at snara sær 180 stig. Tú fert av tínum vegi og letur vilja hansara verða títt mál.

*„Lekedom"*
*Effie Campbell* umsetti.

---

Evangelisturin Andrey Kasuev arbeiðir í Abkhasia. Hann sigur soleiðis: „Eg havi sæð, at tað at boða Guds orð gjøgnum teir sosialu miðlarnar er serliga úrslitagott. Eg finni fólk her í býnum Sukhumi á internetinum og bjóði teimum til okkara møtir. Mong hava longu tikið ímóti innbjóðingini. Hvønn dag sendi eg yvir 300 innbjóðingar út, og eg skrivi saman við nógvum teirra, sum eg sendi til. Hetta er ein serligur máti, sum vit kunnu røkka út til heim, sum ikki kunnu verða nádd á annan hátt."

*e.c.* ums.

---

**SUNNUDAGSSKÚLIN**

| | | |
|---|---|---|
| 29. mars | Tekstur: Matt. 18,21-35 | bíbliuorð: Matt. 6,12 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




*Nr. 8* *5. apríl 2020* *80. árg.*

# Fyrrverandi skøkjan úr Magdala 4:4

*Aril Edvardsen*

Ein skuldi ikki hildið, at fjórða konan við krossin hóskaði saman við hinum trimum konunum. Hon hevði verið ein fallin kona. Hon var ein tiltikin hora úr Magdala, einum býi við norðurendan á Genesaretvatninum. Har hevði hon livað og var vorðin kend, so øll kendu hana undir navninum Maria Magdala, ella umsett til føroyskt Maria Magdalena.

Hon hevði verið ein órein kona. Tíðliga í lívinum var hon fallin í synd og hevði givið seg í djevulsins vald. Ja, hon var vorðin so bundin, at demonirnar drivu hana millum bygdirnar uppi við norðurendan á Genesaretvatni, har hon seldi kropp sín fyri pengar. Hon hevði kastað seg so langt út í syndina, at sjey illir andar vóru farnir inn í hana, sigur Bíblian.

Støðugt reikaði hon um sum hitt falna, hersetta mennsikjað, sum hevði givið seg yvir til devulsligar lystir. At enda var hon fyri ongum, illa farin, ólukkulig og oyðiløgd av syndini.

Men ein dagin møtti hon Jesusi. – Tað gjørdist ein øgilig uppgerð. Demonirnar í henni reageraðu beinanvegin, hon sá Meistaran.

Uppgerðin var stutt, men ógvislig. Tann Heilagi møtti demonunum og óreinskuni. Hon small til jarðar og skríggjaði og ýldi. Tá talaði Jesus til teir illu andarnar í henni: „Farið út!“ Og devlarnir fóru úr henni við hørðum skríggjum, og hon varð liggjandi sum deyð niðri í túninum.

Tá kom Jesus frá Nasaret til hennara. Hann reisti hana upp, og Maria Magdalena var frá hesi stund eitt nýtt menniskja.

Nú stendur hon har saman við hinum trimum konunum við Jesu Kristi kross og sleppur at uppliva tær allarstørstu hendingarnar. Hon varð av sonnum tann, sum Jesus allarfyrst opinberaði seg fyri, eftir at hann var risin upp, og hann bað hana bera hesi boðini víðari til lærusveinarnar.

Hevur tú hoyrt nakað so framúrskarandi? Tað var ein umvend skøkja, sum bar verðini tey fyrstu tíðindini um Jesu uppreisn! Men tað var ein umbroytt skøkja, ein reinsað skøkja, sum var vorðin reinsað frá syndini við Jesu Kristi kross.

*Effie Campbell* umsetti.

# „Dypparar" og „dvøljarar"

*„Verðið (dvøljið) í mær, so verði (dvølji) eg eisini í tykkum." Jóh. 15,4.*

Tað er eitt kynstur at bryggja gott te. Tú kanst dyppa ein teposa upp og niður í tað heita vatnið og blaka hann burtur. Ella kanst tú lata hann liggja so leingi í vatninum, at tú fært eina uppliving av tí fullu styrkini og smakkinum hjá tenum.

Jesus segði: „Verðið í mær, so verði eisini eg í tykkum. Eins og greinin ikki kann bera ávøkst av sær sjálvari, uttan hon verður í víntrænum, soleiðis kunnu ikki heldur tit, uttan tit verða í mær. Eg eri víntræið, tit eru greinarnar; tann, sum verður í mær og eg í honum, hann ber miklan ávøkst, tí at uttan meg kunna tit als einki gera." Jóh. 15,4–5.

Loyndarmálið við einum sigursælum, kristnum lívi liggur í ikki at „dyppa" eitt sindur í Guds nærveru eina ferð um vikuna í kirkjuni, men í at „dvølja" í henni hvønn dag. Tí eru kærleiki og trúfesti eitt hent amboð at fremja tín andaliga vøkstur; hann fær teg at koma inn í Guds orð hvønn dag, grunda á tað og spyrja: „Harri, hvat sigur tú við meg?"

Tá ið tú ert ein „dyppari", skal tú fáa tingini at henda við egnum avreksverki. Tú ert noyddur at flyta posan upp og niður, vinda bandið runt um teskeiðina, toga uppaftur, kanna litin o.s.fr. Tað er eitt størri arbeiði – og tað er ikki soleiðis, at Gud vil hava teg at liva tað kristna lívið. Nei, hann vil hava teg at vera ein „dvøljara". Tað er dýpdin og tíðin, hvussu leingi tú dvølir, sum gera av styrkina og ríkidømið í tínum andaliga lívi.

Tí ljóðar orðið til tín í dag: „Ver ikki ein „dyppari", ver ein „dvøljari".

*„... et Ord til Dagen! Effie Campbell* umsetti.

# Vel Kristus

*„Tann, sum trýr á sonin, hevur ævigt lív.“ Jóh. 3,36.*

Uttan mun til, hvussu mong vánalig val, tú hevur gjørt í fortíðini, kanst tú blíva frelstur við einum góðum vali – valið, at tú gevur Kristusi lív títt og fylgir honum.

Ein rithøvundur skrivar: „Hevur tú nakrantíð hugsað um, hví tað vóru tveir krossar undir liðini á Kristusi? Ella hví Jesus var í miðjuni? Hesir báðir krossarnir ímynda eina av Guds størstu gávum – at vit hava loyvi at velja. Teir báðir illgerðarmenninir hava nógv til felags: Dømdir av somu rættarskipan, dømdir til sama deyða, umgyrdir av somu mannamúgvu, og báðir vóru líka tætt upp at tí sama Kristusi.

Báðir byrjaðu sanniliga við spotti, báðir søgdu ræðulig ting við Jesus. Men annar broytti seg. “... hann segði: „Jesus, minst tú til mín, tá ið tú kemur í ríki títt.“ Og Jesus segði við hann: „Sanniliga sigi eg tær, í dag skalt tú vera við mær í páradís.“ Luk. 23,42–43.

Vit gleða okkum um, at hesin illgerðarmaðurin tók sær annað skinn um bak, men vit skulu eisini minnast hann, sum ikki gjørdi tað. Tað eru tíðir, har Gud sendir toruna at ræða okkum. Tað eru tíðir, har Gud sendir signingar at lokka okkum. Men tað eru eisini tíðir, har Gud bara sendir tøgn, tí hann gevur okkum frælsi sjálv at velja, hvar vit vilja vera í ævinleikanum. Vit hava ongantíð fingið eini størri serrættindi enn tað valið.

Hugsa um illgerðarmannin, sum vendi við. Sjálvt um vit vita ógvuliga lítið um hann, vita vit hetta: Í síðsta enda, blivu øll hansara val sett úr gildi av einum einasta góðum vali. Hann valdi Kristus!“

Og tú kanst eisini taka hetta valið í dag. „Tann, sum trýr á sonin, hevur ævigt lív.“

*„...et Ord til Dagen...“ Effie Campbell* umsetti.

---

Norðmenn siga, at evangeliið skal ikki „diskuteres og vurderes – men praktiseres!“ Hetta var lykilin til framgongd. Lærusveinarnir fóru út og boðaðu evangeliið allastaðni.

*e.c.* ums.

# Ein heroin-narkomanur settur í frælsi

Bob Bennett hevur skrivað sína sjálvsævisøgu í bókini „Korset og Nålen“.

Tey siga, at ert tú fallin til heroin, sleppur tú ikki burtur úr tí uttan mun til, hvat ið tú gert. Men tey fara skeiv. Tað er Bob eitt livandi dømi um. Jesus setti hann í frælsi.

Alt kristiligt var púra ókent fyri hann, og hann var ikki vanur at sita og lurta eftir prædikum, men einaferð, hann fór í kirkju, fekk hann fatur í tí, at Jesus gevur tær eitt ævigt lív. Hann strikar syndir tínar ella søkkir tær niður á havsins botn, uttan nakað gjald, púra ókeypis.

Prestur endaði talu sína so: „Nú hava vit sæð, at vit kunnu fáa syndirnar útstrikaðar, at vit kunnu gerast nýggj menniskju. Tað hevur einki at siga, hvussu lív tykkara hevur verið higartil, ella hvussu mong mistøk tit gera, um tit her og nú velja at geva tykkum til Jesus Kristus, geva honum lív tykkara, tá vil hann skapa tykkum um til nýggj menniskju. Biðið Gud taka tykkara gamla lív og biðið hann geva tykkum eitt nýtt lív.“

Hetta vóru undurfull tíðindi at hoyra, at syndirnar blivu útstrikaðar, at fortíðin bleiv gloymd, at tú kundi gerast eitt nýtt menniskja í Kristusi.

Hann greip um hetta og fekk greiðu á, at filosofi er ikki svarið. Filosofi er mannaorð, men Bíblian er Guds orð. Tað er har, munurin er. Hann bjóðaði Jesusi inn í sítt hjarta og varð settur í frælsi, fríur frá heroin, og so fór hann at lesa teologi. Sum prestur hevur hann sjálvur hjálpt nógvum rúsevnis-misnýtarum. Jesus Kristus er svarið.

*Effie Campbell.*



## SUNNUDAGSBLAÐIÐ

***ynskir øllum einar gleðiligar páskir í Jesu navni!***



## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 5. apríl | Tekstur: | Luk. 19,28-40 og Mark. 15,16-37 | bíbliuorð: | Matt. 21,5 og Jóh. 3,16 |
| 12. apríl | Tekstur: | Mark. 16, 1-15 | bíbliuorð: | Mark. 16,15b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74